Náttúrugripa-savnið Sjó-savnið Jarðfeingi Lista-savnið Fornminnis-savnið

SAVNSFAGNAÐUR 2010

# Eygleiðarin

<u>Uppgáva:</u>
Dentur verður lagdur á, at næmingurin skal tekna tað, hann sær, soleiðis sum hann sær tað, og ikki tað, sum hann heldur.



Tekna tað, tú sært, og ikki tað, tú heldur teg síggja!

*Undir hesi yvirskrift bjóðar Listasavn Føroya skúlaflokkum at njóta ein tíma á savninum saman við savnslæraranum Oggi Lamhauge.*

Savnslærarin fer í stuttum at greiða frá standmyndunum á og uttan fyri savnið. Síðan fáa næmingarnir høvi til at tekna eina standmynd í stuttum teknivenjingum. Dentur verður lagdur á, at næmingurin skal tekna tað, hann sær, soleiðis sum hann sær tað, og ikki tað, sum hann heldur seg síggja.

Teknað verður á karduspappír í A3 stødd við Caran d´Ache vokskriti. Savnið hevur eitt flokssett av tekniplátum í hóskandi stødd sum undirlag undir pappírinum, tá teknað verður.

Fyri hvønn flokkin tekur hetta umleið ein klokkutíma.

Standmyndin *Sitandi maður* frá 1982 eftir Hans Paula Olsen er stoypt úr gipsi, men fyrst evnað til í leiri. Fert tú heilt yvir til standmyndina, sært tú, hvussu listamaðurin hevur evnað standmyndina saman við smáum leirklumpum.

Hans Pauli Olsen úr Havn er føddur í 1957. Hann er útbúgvin myndahøggari á Kongaliga Danska Listaakademinum í Keypmannahavn 1979-87 og arbeiðir við ymiskum tilfari, men hevur serliga áhuga í leiri, sum kann formast upp. Modelleringin í verkum hansara er ósløtt og gloprut og ber listamansins friðleysu og ótálmaðu fingurmerki.